**Nr. 38/2014**

**Páll á Reynatúgvu**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a.**

**Fyrispurningur um tyrlupall í Sandoynni, settur Jørgen Niclasen, landsstýris-manni(at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlan um at fáa til vega góðkendan tyrlupall í Sand-oynni, og um so er nær?
2. Er støðan við verandi lendingarmøguleikum í Sandoynni góðkend, og um so er av hvørjum?
3. Hava verið hættisligar støður í sambandi við tyrlulending í Sandoynni, og um so er nær?
4. Finnast frágreiðingar, sum lýsa lendingarviðurskifti hjá tyrlu í Sandoynni?

**Viðmerkingar**
Tað kemur javnan fyri, at tyrlan verður boðsend í Sandoynna í bráðfeingis sjúkra-ørindum. Ofta eru tað støður, har minuttir gera mun á lívi og deyða. Kortini er eingin góðkendur tyrlupallur í oynni.

**Á Løgtingi, 17. desember 2014**

Páll á Reynatúgvu